**Rundskriv um fráfaringaraldur**

§ 1. Fráfaringaraldurin hjá sáttmálasettum almennum starvsfólki verður framhaldandi sum høvuðsregla 70 ár.

§ 2. Tað áliggur almenna arbeiðsgevaranum at siga alment settum starvsfólki upp í so góðari tíð, at tey kunnu fara úr starvi við endan á tí manaði, tey fylla 70 ár.

§ 3.Arbeiðsgevarar kunnu tó velja at leingja setanina, eftir at starvsfólk hava fylt 70 ár. Tað verður gjørt við at seta starvsfólkið í eitt upp í tvey ára tíðaravmarkað starv.

§ 4. Leingjan eftir § 3 kann verða gjørd fleiri ferðir.

§ 5. Hetta rundskriv er ikki galdandi fyri tænastumenn.

§ 6. Rundskrivið um fráfaringaraldur dagfest tann 16. oktober 2007 fer við hesum úr gildi.

*Fíggjarmálaráðið 1. apríl í 2013*

**Jørgen Niclasen. (sign)**
Landsstýrismaður

Bjarni Askham Bjarnason, (sign)
aðalstjóri